# TÁ GUD BLEIV ÓNDUR

– EG HEVÐI EINA **HUGMYND** AV **GUDI** SUM EIN FITTAN, **GAMLAN ABBA**, SUM VAR **GÓÐUR** VIÐ BØRN. **GUD** VAR TANN GÓÐI OG **ILLIMAÐUR** TANN ÓNDI. MEN Á **ZAREPTA BROYTTIST** MYNDIN AV GUDI. **NÚ** VAR GUD BRÁDLIGA EIN **ÓNDUR** MAÐUR, SUM SENDI **LÍTLAR** DREINGIR TIL **HELVITIS** AT BRENNA, UM TEIR **IKKI TRÚÐU** TÍ, SUM STÓÐ Í **BÍBLIUNI**, SIGUR **SJÚRÐUR SKAALE** UM BARNALEGURNAR Á **ZAREPTA** SÍÐST Í 1970'UNUM. MEN NÚ ER **PEDAGOGIKKURIN** MEIRA **FRAMKOMIN**, HELDUR HANN



**SAMRØÐA**

Páll Holm Johannesen
pallurin@hotmail.com

– Eg varð eisini sendur til Zarepta nøkur summar. Har varð mítt viðbrekna sinni skrætt sundur av nøkrum vælmeinandi, men snævurskygdum og pedagogiskt turrgeldum prædikumonnum, sum hóttu við helvitis ævinliga eldi, um eg ikki trúði ávísum tingum, og fylgdi teirra abstraktu lærusetningum.

Soleiðis lýsir Sjúrður Skaale í tekstasavninum »Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan«, hvussu hann upplivdi barnalegurnar á Zarepta. Og summarlegurnar settu síni spor í Sjúrð Skaale. Í formælinum í somu bók skrivar hann:

– Tá eg aftur fekk tey mentalu beinini undir meg, fór eg at skíggja bæði Brøðrasamkomuna og religión sum heild.

Sjúrður Skaale er eitt slag av einum átrúnarligum bastardi. Hann kemur frá eini familju, sum er sett saman av bæði babtistum, kirkjufólki, pinsum og ateistum. Seinastu árini hevur hann verið ein av ídnastu kjakarunum í virðiskjakinum í Føroyum.

Í tekstasavninum »Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan« skrivar Sjúrður Skaale um, at trúgv bæði kann vera positiv og negativ. Ein reyður tráður í allari bókini er, at tað góða eisini kann vera ringt, og at tað ringa eisini kann vera gott. Stuttliga og skeiva heitið á bókini sipar eisini til, at eingin fatan er absolutt ella endalig. Alt broytist við tíðini - eisini okkara fatan av hvat kristindómur er, og hvussu hann skal livast.

## Óskiljandi hugtøk

Tú skrivar um snævurskygdar og pedagogiskt turrgeldar prædikumenn á Zarepa í tíni nýggju bók. Kanst tú greiða nærri frá, hvat tú meinar við?

Eg vil, áðrenn eg sigi meira, fegin leggja dent á, at tey fyristøðufólk og leiðarar sum eg minnist frá Zarepta, vóru millum fittastu fólk. Tað er eingin ivi um, at tey gjørdu alt í allar bestu meining.

Men tá eg sigi, at nakrir av leiðarunum vóru pedagogiskt turrgeldir, so er tað, tí teir mangan ikki hugsaðu um hvussu tað, teir søgdu, kundi ávirka eitt viðbrekið barnasinni.

Tað tóktisk sum um, at summir leiðarar á legunum høvdu sum mál, at so nógv børn sum gjørligt skuldu verða »frelst«, tá vikan var av.

## Hvussu bóru leiðararnir seg at?

Hjá summum var mátin ógvuliga einfaldur: Fyrst ráddi um at gera børnini tilvitað um vandan fyri at fara til helvitis – og síðani siga, at trúði tú tí, sum stendur í Bíbliuni, so slapst tú undan hesum. Taktikkurin var altso fyrst at skapa ótta – og síðani at bjóða fram bjargingina undan hesum sama ótta.

Tað var kanska ikki hugsað so, men soleiðis upplivdi eg tað. Og av tí, at legurnar bara vóru í eina viku, skuldi alt hetta gerast innan heilt stutta tíð.

Sum sagt: Meiningin var heilt sikkurt góð. Tá í tíðini høvdu nógv fólk eina púra ítøkiliga fatan av helviti sum eitt stórt eldhav, ið fólk máttu bjargast undan. Tí hildu kanska nøkur, sum tað stundum varð sagt, at »tað er betri at forskrekkja fólk inn í himmalin, enn at rura tey í svøvn ávegis til helvitis«.

## Hvussu vilt tú lýsa pedagogikkin hjá leiðarunum?

Uppá flestu mátar var hann góður. Tað vóru jú, sum sagt, fitt og vælmeinandi fólk. Men nógv av børnunum vóru als ikki von at hoyra um »deyða« og »ævinleika« og »frelsu« og »trúgv« og »æviga glatan« og onnur hugtøk, sum tey nú skuldu taka støðu til, tí tað, heilt bókstaviliga, galt lívið.

Og tað er her eg haldi, at pedagogikkurin var heilt av leið. Tí øll hesi abstraktu og óskiljandi hugtøkini vóru brúkt av teimum vaksnu, sum vóru tey størsta sjálvfylgja.

Sannleikin er, at eingin – heldur eingin vaksin – skilir hesi hugtøkini. Menniskjað livir í tíð og rúmi. Tað eru okkara treytir, og vit skilja einki av tí, sum er hinumegin tíð og rúm.

Vit kunnu gott brúka orðini. Tað er lætt at siga »ævigt fortapilsi«. Men einki menniskja kann gera sær eina mynd av eini pínu, sum blívur við og blívur við og blívur við og aldrin, aldrin – veruliga aldrin nakrantíð – heldur uppat. Einki – absolutt einki – menniskja fatar hetta.

Men tá eitt barn hoyrir ein vaksnan tosa um »himmalin« og »helviti« og »ævinleikan« so heldur barnið, at tann vaksni skilir hesi orðini. Barnið roynir at skilja tað sjálvt – men klárar tað ikki.

Tað er ikki góður pedagogikkur.

▶